

*Tað var nógv at hugsa um, tá ið høvundin var á veg aftur úr bóndagarðinum á Felli. Aftanfyri hómast Finnifjørðurin*




*Á hesum leiðum verður oftani koyrt framvið vegskeltum við nøvnum, sum vóru eins kend millum føroyingar inntil 2. heimsbardaga, sum nøvn á bygdum og støðum í Føroyum – eitt nú Vápnafjørður*

útjaðarin eisini er hóttur her, og at fólkið flytir til størru plássini. Soleiðis er tað. Summir garðar liggja púra lívleysir. Onkra staðni kemur fólk viðhvørt at hyggja til seyðin. Aðra staðni eru garðarnir lagdir saman, staðfestir hann.

Á áhugaverdari ferð á lærda háskúlanum á Akureyri síðsta heyst varð fregnast um hetta við fráflytingini, og hvussu tað er við bóndagørðunum. Hoyrdi eina ferð um ein, sum hevði selt garðin, tí hann flutti til stórstaðin. Tá ið spurt varð um prísin, svaraði hann, at hann hevði fingið fyri eina Møsdu ella ein Mazda bil! Prísin avgera útboð og eftirspurningur.

Garðarnir verða ikki virdir ella skattaðir av nýggja ættarliðnum, sum teir onkuntíð hava verið. Men granskari á lærda háskúlanum á Akureyri segði seg vera fullvísan í, at bústaðarmynstrið í Íslandi aftur fór at broytast soleiðis, at gongdin fór at verða úr urbanu økjunum og móti búsetingum úti á landinum.

– Í nýggju tíðini eru tað alt fleiri størv, sum ikki eru bundin at ávísum fysiskum arbeiðsplássi. Tilvitanin um náttúruna økist skjótt millum nýmótans fólk, og harvið verður hetta, at hava náttúruna og møguleikar fyri sovornum upplivingum uttan at skula ferðast eftir teimum, sett alt fremri í virðisvalinum, helt skilamaðurin og vísti á, at tað longu nú eru nógvir íslendingar, sum hava ættarbond kring landið, og sum búgva í býunum, sum hava frítíðarbústaðir kring landið.

Vit hava ongantíð verið á Finnafjørðinum og Felli áður. Men kortini kennist hetta so sera nærverandi og viðkomandi. Umframt lesnaðin, sum er nevndur omanfyri, er orsøkin tað, sum pápi plagdi at siga. Hann tosaði ofta um Ísland og fiskarí á Eysturlandinum og her á leið. Fyrsta skipið, sum hann var til skips við, var Haraldur, sum maður mostur hansara, Jóannes á Váli í Svínoy, førdi.

Jóannes hevði nógv saman við bóndanum á Felli. Tá ið teir riggaðu av og vóru á veg heim í 1937, spurdi bóndin Jóannes, um hann ikki kundi hava knappliga 17 ára gamla dreingin, sum var saman við honum, eftir at hjálpa sær henda veturin. Jóannes svaraði, at drongurin var móður og faðirloysingur, og at hann hevði lovað konuni, sum var mostur at dreinginum, at ansa væl eftir honum og at hava hann við til hús aftur.

– Tá varð avgjørt, at eg ikki skuldi verða íslendingur, plagdi pápi at skemta. Fríðrikur bóndi á Felli var blaðungur tá, og hann átti fleiri døtrar!

Síðstu árini hann livdi, helt pápi fleiri ferðir fyri, at tað hevði verið áhugavert at vitja aftur á hesum leiðum, sum hann mintist og sá fyri sær í huganum. Túrurin varð ikki gjørdur. Tíverri. Nú gerst einki við tað. Hesin summardagurin á Felli ger alt so ógvuliga nærverandi, og tað hevði verið uppaftur meiri áhugavert, um túrurin hevði havt verið gjørdur fyri einum seks árum síðani!

## Sjáldsamt fyribrigdi

Í sama andaleypi, sum Edvard í Svínoy segði frá omanfyri standandi, segði hann hesa søguna um samrøðuna millum Fríðrik, bóndan á Felli, og Símun hjá Póli 12. apríl í 1938. Tá ið hann sipar til Jóannes og Tummas, eru tað Jóannes á Váli og Tummas á Rókini úr Svínoy, sum so syndarliga druknaðu á veg til Svínoyar 1. desember í 1937:

"Fríðrikur fór alt fyri eitt at tosa við skiparan um Jóannes og Tummas, sum plagdu at vera við Haraldi, ið altíð var inni á Finnafjørðinum og keypti sild, ís og seyð. Hann segði:

"Eg kendi teir sera væl. Teir vóru ofta í landi og uppi hjá okkum. Tummas hevði sagt fyri konu mínari, seinastu ferð, teir vóru inni hjá okkum, áðrenn teir sigldu heim um heystið, at hann ætlaði sær at halda jól á Finnafjørðinum tað árið (1937).

Nú hendi tað henda dagin í fjør – 1. desember kl. 5 seinnapartin. Eg var beint tá innkomin og hevði sett meg at eta døgurða í køkinum. Kona mín sat og seymaði frammanfyri vindeygað í stovuni, har tað er stak gott útsýni yvir fjørðin...Nú sær hon alt í einum Tummas og Jóannes koma upp á bakkan í yvirfrakka við hvør sínum kufferti í hondini og ganga beint niðan móti húsunum hjá okkum. Konan rópar á meg:

"Fríðrikur, skunda tær út og tak ímóti teimum!"

Eg fór út alt fyri eitt og vestur um húsini, men sá einki. So fór eg runt um húsini og sá heldur einki...Men kona mín segði, at hon eygleiddi teir, inntil teir gingu undir eystan fyri húsini hjá okkum. Vit vóru illa við og skiltu, at tað var ein yvirnáttúrlig sjón, vit høvdu sæð. Vit vóru ógvuliga góð við teir báðar. Teir vóru ekta góðir menn. Kona mín sovnaði ongantíð ta náttina.

Dagin eftir hoyrdu vit í íslendska útvarpinum um vanlukkuna við Pride, postbátinum, og nøvnini vórðu upplisin á monnunum, sum deyðir vóru".

Hetta hendi sama dag og somu tíð, sum vanlukkan fór fram, so mangt er millum himmal og jørð, sum vit aldri koma at skilja".

Soleiðis greiddi Edvard í Svínoy frá ferðini hjá sær á Finnafjørðinum í 1938.

Vit biðja farvæl í august 2005. Hetta hevur verið serliga áhugaverd vitjan so at siga í farnari tíð. Kona Fríðrik og harvið mamma Jósup, sum vit hava heilsað uppá, upplivdi omanfyri standandi fyrsta desember í 1937. Nú hevur Jósup júst sagt okkum, at mamma hansara sjálv doyði fyrsta desember í 1938.

Vit standa eina løtu og sodna tað, sum hesi trý korterini hevur verið okkum fyri á Felli, áðrenn farið verður longri fram á vegin. Hesa leiðina kendu forfedrar okkara eins væl og teir kendu Føroyar.

## Ókendari leiðir

Nú seta vit kós móti Mývatni. Harvið verður ferðin aftur á ringvegnum kring Ísland. Tað vil við øðrum orðum siga, at vit ikki longur verða hinumegin ringvegin, sum tað plagar at verða tikið til. Av Finnafjørðinum og vestur til Mývatn er teinurin í beinari linju umleið hundrað kilometrar. Vegaføringin ger, at tað er neyðugt at koyra fram ímóti dupulta teininum.

Eitt tað fyrsta plássið, sum tað verður koyrt framvið, eru Bakkafjørðurin og síðani Vápnafjørðurin. Tá ið tíðin, sum føroyingar vóru til lands í Íslandi, varð umrødd í 2. parti av hesum hugleiðingum, varð víst á fleiri skrivligar keldur. Tíverri varð ikki nevnt, men tað verður so gjørt nú, at FF blaðið fyri trimum árum síðani gjørdi fitt burturúr føroyska útróðrinum á Eysturlandinum og serliga í hesum økinum. Tey, sum eru áhugað fyri at lesa, hvat altíð produktivi Óli Jacobsen fekk burturúr, kunnu leita í FF bløðunum í 2003.

Tá ið vit koma longri fram á leiðini, sleppa vit teimum leiðunum, har føroyskir fiskimenn í so mong ár vóru staðkendir. Í fínu ferðafrásøgn síni um ferð í Íslandi í 1977 heldur D. P. Danielsen, sáli, fyri, at her komu sluppmenn okkara og teir, sum vóru til lands, ongantíð. DP sigur, at hetta var orsøkin til, at føroyingar ongantíð komu í samband við íslendska fólkið reiðuliga. Hóast teir gistu landi teirra á hvørjum sumri, so rann ongantíð saman. Okkurt giftarmál. Men ongantíð nakað árin av álvara, heldur DP, sum lýsir koyritúrin fram móti Mývatni við so stórum innliti, at tað her verður lopið um.

Svávulslukturin gerst ramur, tá ið Mývatn er í nánd. Og ferðafólkini eru ógvuliga mong. Tey bera hesa ársins tíðina inntøkur og arbeiðspláss við sær til nógvar íslendingar. Tá ið vit finna býli á vallaraheiminum, er tað hálvur sumbingur, sum fryntliga syrgir fyri nossliga kamarinum.

Bláa lónið er væl kent hjá teimum, sum hava vitjað í Reykjavík. Fyri fáum árum síðani varð sama slag av tilboði sett á stovn við Mývatn, um enn tað ikki hevur somu fasilitetir sum í høvuðsstaðnum.

Klokkan er næstan ellivu á kvøldi, tá ið vit í slavtoku koyra teir tríggjar kilometrarnar til hetta staðið, sum man vera eindømi í heiminum. Tað tykist púra manntómt, men á parkeringsplássinum eru bussar og bilar, og inni í hylinum er nógv fólk. Í nógva hitanum og roykinum og tokuni eru íslendingar, fransmenn, kinverjar, japanarar og aðrar tjóðir. Tíðin tykist standa í stað, og tað verður dúgliga prátað í hyljum og pottum og uppaftur heitari rúmum.

Biltúrurin kring Mývatn, sum er 37 ferkilometrar til víddar, er rættuliga grunt og hevur einar hálvt hundrað hólmar í sær, er hugnaligur. Meðan vit koyra spakuliga og nýta útsýnið henda hálva tíman, greiðir sonur stórskaldið og Nobel vinnaran, Haldór Laxnes, í Útvarpinum frá barnaárunum í Reykjavík. Í millumkrígstíðini, sum hann umrøður, var Reykjavík ikki nógv størri býur enn Havnin. Merkisvert er, hvussu nógv yngri Laxnes sigur, at heimsskaldið var burturi í heimi og skrivaði, og hvussu ofta sambandið – politiska, mentanarliga og vinnuliga og handilsliga – millum Reykjavík og Ísland og Keypmannahavn verður nevnt.

Náttin er friðfull, og leygarmorgunin gera vit av at venda eitt sindur aftur og at koyra til Dettufoss og so norður eftir framvið Öxafirði, Skjálfandi og umvegis eitt nú Húsavík og til Akureyrar. Hetta verður vent aftur til. Nú er ikki pláss fyri meiri á hesum sinni.

Í 2. parti varð heimferðin hjá Vaagen úr Íslandi søgd at vera í 1890unum. Skilamaður vísir á, at hon var í 1888. Tað var tankatoskur, tá ið tað varð sagt, at tað var Kvívíks Tummas, sum yrkti Vaagen. Sjálvandi var tað Jóan Petur uppi í Trøð, IPG, sum í 1867 og nøkur ár fram var til skips undir Íslandi. Vísan var fyrstu ferð á prenti í Føroyingatíðindum nr. 4, 15. februar 1894.

Fyrsti partur av higartil trimum ferðahugleiðingum hjá Jóannesi Hansen var í Sosialinum fríggjadagin 24. februar, og annar partur var í blaðnum fríggjadagin 17. mars.



*Síðani 2004 hevur tað staðið íslendingum og ferðafólkum við Mývatn í boði at njóta náttúrubað átókt Bláa lóni, sum er kent av Reykjavíkar leiðini*